# Reglugerð fyri flogfenaðhald (húsdýrahald)
# í
# Tórshavnar kommunu

Við heimild í §§ 23, 26 og 32 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur verður hendan reglugerð sett í gildi.

### *Øki og lýsingar*

**§ 1.** Reglugerðin fevnir um uttandura húsdýrahald av flogfenaði í Tórshavnar kommunu. Reglugerðin fevnir ikki um bygdirnar Hvítanes, Norðradal, Syðradal, Velbastað og Kirkjubø.

*Stk. 2.* Reglugerðin fevnir tó ikki um vinnuligt virksemi, ið hevur umhvørvisgóðkenning sambært kap. 5 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd.

*Stk. 3.* Flogfenaður eru høsn, gæs, dunnur, kalkunir, dúgvur og aðrir fuglar.

### *Krøv til flogfenaðhald*

**§ 2.** Í øllum tættbygdum øki (býarlíkum býlingum) í kommununi skulu tey, ið fara undir at halda flogfenað, gera tað í samsvari við hesa reglugerð.

*Stk. 2.* Tey, ið ætla at halda flogfenað, eiga at boða næstu grannum sínum frá, og kunnu spyrja seg fyri hjá kommununi um ivamál.

*Stk. 3.* Flogfenaðhald, ið longu er skipað, áðrenn reglugerðin kemur í gildi, kann halda fram sum er, men kann tó koma undir reglurnar í §§ 3-5, herundir kunnu krøv ella forboð verða sett teimum.

### *Krøv til búr, garðar, girðingar, hús og tilíkt*

**§ 3.** Búr, hús ella tilíkt bygningskent tilhald hjá flogfenaði skal vera í minsta lagi 2,5 m frá marki til granna.

*Stk. 2.* Girðing skal antin vera púra tøtt, ella vera í minsta lagi 0,5 m frá marki til granna, tá talan er um hegn, rimagarð ella tilíkt.

*Stk. 3.* Girðingin skal gerast forsvarliga, eisini so at annar fuglur ikki fær flogið inn, og um neyðugt, skal net spennast yvir.

*Stk. 4.* Búr og hús skulu lyftast 0,35 m upp frá jørðildinum at tryggja móti rottu. Tó ikki gásarhús, ið kunnu vera grivin niður í svørðin.

*Stk. 5.* Ikki er loyvt at hava flogfenað gangandi leysan á gøtu, vegi ella øðrum øki, sum er opin fyri vanligari ferðslu ella aðrari atgongd hjá fólki.

*Stk. 6.* Hanar mugu ikki vera uttandura millum kl. 21 á kvøldi og kl. 8 á morgni.

### *Fóður og tílíkt*

**§ 4.** Fóður skal goymast í rottutryggum íløtum.

*Stk. 2.* Leivdir frá húsarhaldinum kunnu bert gevast sum fóður, um avlop verður tikið burtur beint eftir, at tað er givið og í seinasta lagi á kvøldi.

*Stk. 3.* Búr, hús o.t. skulu regluliga sópast og haldast rein. Girðingar skula haldast í góðum standi.

*Stk. 4.* Tøð (skarn) frá húsdýrahaldinum skal antin burturbeinast til tyrvingarplássið ella gravast niður á egnari grund, í minsta lagi 2,5 m frá marki til granna.

### *Boð, treytir og forboð*

**§ 5.** Um húsdýrahald av flogfenaði, hóast reglugerðina, elvir til ampa, sum stink, gang, nógva flugu, rottu, kann Tórshavnar kommuna seta forboð fyri haldinum ella áleggja treytir fyri at flogfenaðhaldið kann halda fram. Kommunan kann eisini geva ítøkilig boð um ábøtur ella broytingar í flogfenaðhaldinum.

### *Undantaksloyvi*

**§ 6.** Í serligum førum, serliga eftir samtykt frá grannum, kann Tórshavnar kommuna eftir áheitan, geva smærri frávik frá ásetingunum í §§ 2-4.

### *Kærumál*

**§ 7.** Avgerð hjá Tórshavnar kommunu eftir hesi reglugerð kann innan 4 vikur kærast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna. Fellur kærufreistin á ein leygardag ella sunnudag, verður hon longd til næsta gerandisdag.

### *Revsireglur*

**§ 8.** Um treytir sambært hesi reglugerð, boð ella forboð ikki verða hildin, kann brotið verða revsað við bót sambært § 41 í kunngerð nr. 53 frá 1994 um umhvørvisreglur og § 72, stk. 3, í løgtingslóg nr. 134 frá 1988 um umhvørvisvernd, er ikki harðari revsing ásett í aðrari lóg.

### *Gildisreglur.*

**§ 9.** Henda reglugerð, sum samtykt á býráðsfundi tann 6. oktober 2005 og er góðkend av Heilsufrøðiligu starvsstovuni tann 28. oktober 2005, kemur í gildi 1. januar 2006.